Summar SURR



Uni Arge
uniarge@gmail.com

# Nú grør á grasplenuni

Øll bíða eftir summarinum, og kanska kemur tað ikki í ár, men alt, sum plagar at henda um summarið, hendir kortini, so tað kunnu vit um ikki annað gleðast um.

Eitt, sum eg fyri fyrstu ferð havi roynt í ár, er at gera grasplenu. Tá fræið var farið á moldina, og hon hevði fingið nóg mikið av vatni, vildi eg síggja mun sum skjótast.

Hvussu eg so leitaði, sást ikki eitt einasta grasstrá nakrastaðni. Var moldin ikki góð? Skuldi hon hava kálk? Ella meira vatn? So var tað, at onkur nevndi kunsttøð.

Grønar fingrar havi eg ongantíð havt, men tað kann væl brúkast at vera ótolin, eisini í moldini, so eg fór til stroks og keypti kunsttøð og meira fræ.

Tríggjar dagar seinni helt eg meg síggja, at stráini høvdu hug at koma undan, men gróðurin var ójavnur. Stroyddi so meira kunsttøð og fræ á moldina, og tað riggaði.

Nú grør bara væl. Grasið er fagurgrønt, og eg gleði meg at sleppa at sláa tað. Málið var at hava grasplenu á ólavsøku, og helst fer tað at ganga.

Eitt havi eg tó hugsað, meðan eg havi staðið við spulislanguni og eygleitt verkið. Fleiri áttu at boðið seg fram at ráðgivið amatørum sum mær í tílíkum málum.

Handilsfólkini eru fryntlig og rímiliga góð í ráðum, og vanlig fólk siga ofta ymiskt um urtagarðsrøkt. Men hvar spyrt tú, tá tú skalt vita, hvussu tú gert eitt nú grasplenu?

Kanska onkur kundi sett á stovn eina ráðgeving, sum burturav tók sær av at leiðbeina fólki í urtagarðsrøkt. Vit amtørar høvdu heilt vist sligið upp á tráðin.




**Gott hann ikki fór í holt við konufólk**
Fullur maður spældi við krokodillu
*Portalurin*

## Eingin samanhangur

Onkur mundi helst hugsað sítt, tá ið hendan plakatin var komin upp at hanga í Miðlahúsinum. Var hetta nú ein fráboðan frá leiðsluni, ella var tað eitt mótmæli. Tíbetur var talan bert um eina plakat fyri sjónleiki, sum verður spældur í Havnini – og tí er eingin samanhangur millum plakatina og staðið, har hon hongur.

## Tónleikaveitsla í Gøtu



Hetta vikuskiftið verður G! Festivalurin hildin í Gøtu. Fyrstu konsertirnar vóru í gjárkvøldið, og festivalurin heldur fram í dag og í morgin. Millum tey, sum skulu spæla hesar báðar dagarnar eru Nephew, Aech Enemy, Brandur Enni, Páll Finnur Páll og Eivør Pálsdóttir.

**G! FESTIVALUR**
**HÓSDAGUR 15/7-LEYGARDAG 17/7**




## Øll hugsandi tilboð

Heimsmeistaraheitið í fótbólti hevur júst verið í Suðurafrika, og í tí sambandi verða nógvar vørur seldar meira, enn tær annars verða seldar. Stórur eftirspurnignurin er eftir eitt nú fótbóltstroyggjum, drykkivørum og flatskíggjum, og eisini her heima í Føroyum ræður kreativiteturin. Hetta komu vit fram á í einum handli undir HM-kappingini. Føroysk mjólk upp á HM-tilboð. Sig so tað!

**Hvussu høgt?**
Fólkatónleikastevnan í hæddini
*Portalurin*

**Nýggj føroysk drotning?**
Annika vil stjórna kongaríkinum
*Sosialurin*



## Undirhaldandi action-filmur

Tom Cruise og Cameron Diaz hava høvuðsleiklutirnar í hesum actionfilminum. Cameron Diaz hittir alt í einum meistaranjónsnaran, sum verður spældur av Tom Cruise, og so hendir bæði eitt og annað í lívinum hjá Diaz.

**KNIGHT AND DAY**
**HAVNAR BIO**
**FRÁ HÓSDEGNUM 22/7**



**Útferð?**
193 hval í Húsavík
*Kringvarpið*



## Útferð við Draganum

Leygardagin verður skipað fyri hugnaligum og áhugaverdum siglitúri við seglskipinum Draganum.

Farið verður av Klaksvík kl.14. Leiðin gongur norður undir tey stórslignu fuglabjørgini á Kalsoynni og norðara Nakkin á Kunoynni. Túrurin tekur áleið 3 tímar. Tilmelding á Norðoya Kunningarstovu

**ÚTFERÐ VIÐ DRAGANUM**
**LEYGARDAGIN 17/7 KL. 14.00**

## Framsýning við Edith Mørkøre

Mánadagin letur upp framsýning við málningum hjá Edit Mørkøre. Framsýningin verður á Áarvegnum 14 og er opin í eina lítla viku.

**EDITH MØRKØRE**
**FRAMSÝNING Á ÁARVEGNUM 14**
**FRÁ MÁNADEGNUM 19/7**

## Laksatorg í Runavík

Tey, ið hava hug at royna eitt serstakt laksatorg og annað í tí sambandinum, fáa møguleikan til hetta í Runavík leygardagin . Á torginum er leskiligt laksaborð við ókeypis smakkiroyndum til øll vitjandi. Umframt hetta verður nógv annað á skránni, millum annað tónleikur, kappingar og sølutorg.

**LAKSATORG Í RUNAVÍK**
**LEYGARDAGIN 17/7 KL. 10-16**

**Avgerast við kappkoyring**
Kapping um bussleiðina í Havn
*Dimma*



**Imponerandi gransking**
Vánalig umsiting av fiskivinnuni er ein hóttan móti fiskivinnuni.
*Niðurstøðan í gransking*

**Kundi verið verri! Alkohol!**
Bakteriur í drekkivatninum í Nólsoy
*Portalurin*

Summar
**Sosialurin** - Postsmoga 76 -110 Tórshavn - Tlf. 341800
Hugskot og viðmerkingar kunnu sendast til: post@sosialurin.fo
**Redaktørur:** Eyðun Klakstein